Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Samskipan av bjarging og tilbúgving

Spurningar:

1. Hvussu verður bjarging og tilbúgving samskipað í Føroyum í dag, og í hvønn mun og á hvønn hátt samskipar landið bjarging og tilbúgving?
2. Hvussu nógvar alment fráboðaðar bjargingar vóru í Føroyum 2023 og 2024?
3. Hvussu er samskiftið millum partarnar skipað, tá ein bjarging skal fremjast?
4. Metir landsstýrismaðurin, at Føroyar eru brynjaðar til stórar vanlukkur á sjógvi og landi?
5. Arbeiðir landsstýrismaðurin við ítøkiligum ætlanum á hesum øki?

Viðmerkingar:
Bjargingarátøk bæði á sjógvi og landi hava hjálpt mongum føroyingi eins væl og útlendingum í Føroyum ígjøgnum tíðirnar. Tá illa stóð til, varð hjálp tilkallað, og bjarging var á veg beinanvegin.

Nú hoyra vit um skip, ið stoyta saman á havleiðum nær okkum og olja og bensin lekur á sjógv. Hetta kann elva til stóran skaða á náttúruna, bæði á sjógvi og landi.

Føroyar eru eitt fjallaland, eins og vit hava sjógv runt okkum so langt, sum eygað sær. Dagliga sigla nógv skip í føroyskum sjóøki. Hetta krevur nógv av bjargingartilbúgvingini í Føroyum. Umframt hetta hava vit fleiri tunlar og vegir, sum krevja nógv av trygd og tilbúgving.

Bjargingarfólk gera eitt dygdargott arbeiði, har tey vága lív fyri at bjarga fólki. Alarmsentralurin á politistøðini í Havn eins og MRCC saman við Atlantsflog, kommunum og fjallabjargarum hava eina sera týdningarmikla uppgávu viðvíkjandi bjarging og tilbúgving í Føroyum.

Spurningurin er, hvønn leiklut landið hevur í at samskipa bjargingina í Føroyum, um Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur nøktandi orku at røkja leiklutin, og um landsstýrið er ein sentralur viðspælari í samskipanini á økinum.

Fyri at fáa at vita, hvussu samskiftið er millum allar partar, hvussu vit best samskipa bjarging og tilbúgving í Føroyum, og fyri at fáa greiðari innlit í, hvussu landið samskipar bjarging og tilbúgving í Føroyum, verður hesin fyrispurningur settur landstýrismanninum.

Á Løgtingi, 14. mars 2025

Jóhannis Joensen